## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Nøkur orð til familjuna á Váli



Nøkur orð til familjuna á Váli, sum eru so hart roynd hesar dagar. Fyrst vil eg nevna gleðistundina afturi undir gallarínum niðan eftir í Betesda, tá ið Líggjas á Váli í 1943 fortaldi mær og okkum um JESUS Kristus og Orðið greip mítt hjarta, so eg mátti bróta Líggjas av og reisti meg upp og takkaði fyri frelsuna, við míni stamandi tungu, takka Jesusi fyri, at Hann doyði fyri meg á Golgata krossi. Hetta bleiv mín frelsudagur.

Líggjas og eg gjørdust lívsvinir. Seinni komu Anna og børnini inn í myndina. Tað rann væl saman millum húsini. Mong ferðin varð gjørd við evangeliinum runt landið. Bert ævinleikin veit, hvussu mangar sálir eru náddar inn um himmalsins portur av vitnisburðinum hjá Líggjasi og hansara húsi. Tó eigur Harrin alla æruna fyri tað, so vit kunnu takka Gudi, at hesar oyggjar hava átt slíkar sangarar. Tað er ein gáva frá Gudi, sum vit takka hjartaliga fyri.

Men nú brestur fyri mær, tá ið eg hugsi um tíðina saman við Ólavi, tær undurfullu løtur saman á Akri Guds, bæði á sjógvi og landi, kanska serliga umborð á Norrönu, fyrst um borð á tí gomlu, síðan nú á tí nýggju. Bert tey, sum kendu Ólav, skilja, hvat eg tosi um, hvussu Ólavur var, tá ið á stóð at boða evangeliið. Hansara stilla sinni og stóra dirvi, tað eru góð minni at eiga. Tá ið eg fekk boðini, at Ólavur var farin inn í dýrdina, kendist tað sum ein stór eik var rivin upp við rót, øll møtini um borð á Norrönu, tann kraftin, hann hevði at syngja, og vitnisburður hansara var so hjartaligur og ikki minst smíl hansara til at taka samtalur og mangt annað, sum vit standa spyrjandi fyri í dag, nú hann er farin.

Og góða Anna, orð røkka stutt og eru so fátæk, men eg vil í kvøld saman við familju okkara taka um tykkum í sorgini og biðja tann almektiga Gud senda tykkum troyst, styrki og gleði. Tað verður ikki leingi, til vit síggjast afturí tí himmalska landi, har Harrin skal turka hvørt tár av eygum okkara. Deyðin skal ikki verða longur, og hvørki sorg, skríggj ella pína skal vera longur, tí hitt fyrra er farið. Opinb. 21.4.

Harrin signi tykkum øll. Bestu heilsanir við Sálm. 111.6.

**Gretha og Levi Joensen**

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at elskaða mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Olbana Eiðisgarð**
**Eiði**

andaðist 6. mars, 91 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Mizpa hósdagin 10. mars kl. 14.00.

*Vegna tey avvarðandi*

**Signy, Thorleif og Elsebeth**

---

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri ta stóru samkenslu og hjálpsemi, ið varð sýnt okkum, tá ið okkara góða genta, dóttir, systir og svigarinna

**Maud Sonja Justinussen**

fór til sín seinasta hvíldarstað.

Hjartans tøkk øll somul.

**Pauli Heri, Stefani, Jógvan, Joan, Ólavur og Jona**

---

# Borðtennissamband Føroya 25 ár




*Myndin er tikin í samband við fyrsta borðtennisdystin í Føroyum, sum var leiktur í 1957 í Havn millum Kyndil og TBF. Leikararnir vóru f.v.: Hendrik Rubeksen, Kyndil, Pole Rasmussen, Kyndil, Vagnar Olsen, Kyndil, Torbjørn Mikkelsen, Kyndil, Annfinn Rubeksen Nielsen, Kyndil, Harry Johansen, Kyndil, Thorolf Dam, TBF, Sverre Midjord, TBF, Niels Midjord, TBF, Niels Pauli Niclasen, TBF, og Sigurbjørn Niclasen, TBF. Eisini kann nevnast at tværamenninir leiktu við nýmótans battum við gummi á síðunum, meðan havnamenninir bert høvdu træsíður. TBF vann dystin 4-2*

**Í samband við at liðin eru 25 ár síðani BTSF varð sett á stovn, verður skipað fyri jubilæumskapping í ítróttarhøllini í Trongisvági leygardagin 12. mars kl. 13.00**

### Tíðindaskriv

Kappast verður í ein- og tvímansleiki í øllum deildum hjá bæði gentum og dreingjum, og sum nakað serligt, so verður eisini høvi hjá fyrrverandi leikarum at verða við. Hetta verður skipað soleiðis, at møguleiki verður at luttaka í deildunum Old Girls og Old Boys, sum eru fyri leikarar yvir 35 ár. Tilmelding er ikki neyðug, so øll eru vælkomin.

**Við ítróttarkvøðu BTSF**

---

**Dagurin**

**9. mars. Fjøruti riddarar,** deyðir í 320. Keisarin Licinius gav boð um, at øll kristin skuldu avnokta trúnna. Fjøruti riddarar í Sebaste í tí núverandi Turkalandi vildu ikki gera eftir boðunum og vórðu settir naknir út á ein ísflaka, men teir valdu allir, uttan ein, heldur at frysta í hel enn at ganga frá trúnni. Sum veðrið var henda dagin, skuldi tað vera teir komandi 40 dagarnar.

*Sverri kongur Sigurðsson doyði hendan dagin í 1202 í Bergen.*